## Spaðar 5 í REX

Vælumtókti bólkurin hjá Joen Magnusi Danielsen og Ólavi Øster Spaðar 5 spælir leygarkvøldið til dans í REX.

The grand old man í føroyskum tónleiki Ólavur Øster hevur í 30 ár verið millum Føroya allar bestu gittarleikarar, meðan Joen Magnus hevur verið ein markant songrødd á føroyska tónleikapallinum síðan fyrst í 90'árunum. Í Spaðar 5 møtast hesir báðir í eini frálíkari samanseting, sum stuðlað av einum góðum bólki megnar at fylla eitt hvørt dansigólv. Hetta kvøldið er 25 ára aldursmark í REX.

Fríggjakvøldið er REX karmur um 80'ára discoteque við Ottar í Funningsstovu.

**nud**

## Kært barn har mange navne

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið spælur ein bólkur ið kallar seg Leikmenn í Café Nattúr. Hetta er ein partur av bólkinum "EGR2PLZ", sum eisini er kendur sum "Orkestriiiið her vestriii" ella "Four Aces", sum uppaftur er ein partur av nú burturgingna bólkinum Fluffy Toys.

Leikmenn eru báðir gittarleikararnir í oman fyri nevndu bólkum, Bjarti og Dagfinn. Teir fara at spæla góðan kendan tónleik, bæði gamlan og nýggjan, og uttan iva man 1 veit iiii fara at verða millum løgini.

**nud**

## Holgar og Villmenn í Havn

Undirsjóvartunnilin millum Vágarnar og Streymoynna, hevur havt nógv at týða fyri vágafólk og tey sum skulu til Vágarnar. Men hetta vikuskiftið verður tunnilin nýttur til útflutning av Føroya bestu kontripunkarum, og ja, Glitnir verður ongantíð tað sama aftur.

Bæði fríggja- og leygarkvøldið spæla Villmenn í Glitnir.Teir lova havnarfólki eina rúgvu av slagarum, kontri, rokk og tað meira fólksliga.

Vágasound hevur fingið ein heilt nýggja dimensión í Villmonnum, hetta er ivaleyst Føroya garrvillasti dansibólkur, á G! og MjúS vóru teir frálíkir, nú fyrireika teir seg til Global Battle og the Bands og eru í toppformi.

**nud**

## Gestir næstan lidnir

Gestir eru næstan lidnir við upptøkurnar av fløguni "Burtur frá Toftunum". Nú verur fari til London, har 3 Gestir og tøkningurin hjá teimum Jens L. Thomsen búgva, at leggja síðstu hond á upptøkurnar.

Gestir vóru fyrr í mánaðanum í Lundgaard upptøkuhølunum í Vejen í Danmark, og tóku fløguna upp. Væntandi kemur fløgan út seinni í ár.

**nud**

## 2x Signar á Sandi

Leygarkvøldið fáa sandingar og sandoyingar annars høvið at hoyra Signar í Homrum ikki færri enn tvær ferðir, fyrst í Texas og síðan saman við bólkinum Rok í Virkinum.

Signar, ið gjørdist heimskendum í Føroyum við bólkinum Kjølum, hevur seinastu árini verið virkin, sum einstaklingur og í ROK. Í Prix Føroyum í ár, vístu Rok, at teir eisini meistra lagaskriving. Signar spælir í Texa frá kl 21.00 til kl 23.00. Síðan fara Rok at spæla til dans í Virkinum.

**nud**




# Kular Røtur út sum sangbók

**Bókadeild Føroya Lærarafelags og Føroya Skúlabókagrunnur hava í felag givið út sangbókina KULAR RØTUR við sangum eftir Steintóri Rasmussen o.ø. Edward Fuglø hevur myndprýtt sermerktu útgávuna**

NÝGGJ SANGBÓK



*29 av teimum væl umtóktu Kular Røtur sangunum eru við í snøggu nýggju, sangbókini við gyltari permu*

Á jólum 1999 kom tann fyrsta av trimum fløgum við Kulum Rótum. Nógvir av sangunum gjørdist alt fyri eitt sera væl umtóktir, og skjótt var fyrsta fløgan uppseld. Alt árið 2000 varð nógv spurt eftir teimum væl umtóktu Kulu Rótunum, og saman við góðu vinunum Trølla Pæturi, ommuni og Nósa varð sungið og dansað fyri børnum í øllum aldri. Til jóla tað árið kom so onnur fløgan.

Summarið 2001 fóru Kulu Røturnar eina minniliga ferð til Grønlands, og eftir tað fóru trøll og børn spakuliga hvør til sítt. Kanska var orsøkin, at Trølla Pætur var vorðin filmsstjørna, og ein av kulu rótunum, Brandur Enni, barnastjørna. Men ein fløga kom kortini afturat í 2002.

Skjótt gongur tíðin. Men Kular Røtur eru ikki gularøtur. Tær spillast ikki eins og vanligar røtur og plantur, og tíðin hevur víst, at sangir sum "Hon er omma mín", "Karin", "Vera" og "Tey kalla meg Babe" eru vorðnir fólkaogn.

Í nýggju sangbókini við gyltari permu eru 29 sangir við nótum og besiffringum, sum Magni Husgaard hevur gjørt. Edward Fuglø hevur sniðgivið og myndprýtt og prentvirkið Cre8 hevur brotið um og greitt bókina til prentingar.

Grímuleikur:

# Ferð gandakalsins

**Í vikuskiftinum 21.-23. oktober 2005 skipar MáF saman við Havnar Sjónleikarafelag fyri verkstaðnum "Ferð gandakalsins" í Sjónleikarhúsinum. Skeiðið er ætlað øllum sjónleikaráhugaðum yvir 15 ár**

SJÓNLEIKUR

Við improvisatiónum, spæli og dansi fara luttakarnir á skeiðnum at lata hurðina upp inn til grímunar máttmikla heim, har tey fara at rannsaka tvey sløg av grímum: Ta neutralu og ta arketypisku.

### Kenslunar mál

Í mong hundrað ár hevur gríman um allan jarðarknøttin verið hildin at vera heilag, og náttúrufólk, shamanar, gandakallar og -kvinnur hava brúkt hana sum eitt sambindingarlið til gudanna og and-anna heim.

Ígjøgnum grímuna tosar menniskjað kenslunar mál. Tað eru stóru kreftirnar, ið leika á, vreiði gudanna, girndarhugur djóranna ella djúpasti longsul menniskjans, sorg og kærleiki. Tað kann vera gandakend roynsla at geva seg undir grímuna og lata hana leiða grímuberan hagar, hon vil.

Lærarar á skeiðnum eru 24 ára gamla Anna Katrin Egilstrøð av Eiði, sum síðan 1994 hevur fingist við sang, dans, teatur og framførslu í Danmark og Føroyum. Hon býr í Keypmannahavn, har hon er dukkuførari, grímuberi, dukkumakari og forsangari í miðaldarorkestrinum "Virelai".

32 ára gamla Annemarie Jeppesen, sum seinastu 10 árini hevur verið dukkuførari, sjónleikari, instruktørur og teksthøvundur, og í dag er partur av dagligu leiðsluni í Scene1 í Keypmannahavn.

30 ára gamla Anne Louise Munch, autodidakt multilistavinna, sum alla sína tíð hevur arbeitt við tónleiki, teatri, skaldskapi og listahandverki. Í løtuni er hon listafólk á Scene1, klarinettistur í bólkinum SUNA og listahandverkari í "Q-smiðjuni" í Christiania.



*Á sjónleikaskeiðnum "Ferð gandakalsins" fara luttakarnir at granska gátaføra heimin hjá grímuni*

<u>Stað:</u> Sjónleikarhúsið í Havn
<u>Tíðir:</u> Fríggjadagin 21. oktober: kl. 19.00-21.30
Leygardagin 22. oktober: kl. 10.00-17.00
Sunnudagin 23. oktober: kl. 10.00-15.00

<u>Kostnaður:</u> kr. 600,00. Íroknað prísin er undirvísing, døgurði og kaffi.
<u>Tilmelding:</u> Hjá MáF, 315624 ella maf@maf.fo í seinasta lagi 7. oktober 2005.

Luttøkan er avmarkað. Meira fæst at vita frá MáF, tlf. 315624.

# Aldurbárin á heystframsýning

KONSERT
*tíðindaskriv*

Í samband við Heystframsýningina í gomlu stálgoymsluni á Tórshavnar Skipasmiðju, verður konsert sunnudagin 25. september kl. 16.00, har ið limir úr Aldubáruni fara at borðreiða við tónleiki. Tónleikurin er allur skrivaður í 20. øld, byrjandi við franska tónaskaldinum Claude Debussy og so ein perlurøð av mætastu nútíðartónaskøldum, m.a. Berio, Krenek og Kurtag.

Aldubáran er mannað eitt sindur annarleiðis hesuferð. Bert trý fólk. Floyta, trombon og guitar. Vegna tess, at regluligi floytuleikarin Andrea Heindriksdóttir er stødd uttanlanda, hevur Bernharður Wilkinson játtað at vera við á floytuni. Bernharður er mest kendur her heima sum dirigentur hjá Føroya Symfoniorkestri, men er hann framúr floytuleikari og hevur ferðast víða um við sínum floytukynstri. Bernharður byrjaði longu sum smádrongur at syngja í Westminster Choir. Síðani gekk hann á Royal Manchester College of Music. Sum kamartónleikari hevur hann framført í m.a. Wigmore Hall, Carnegie Hall, Sydney Opera House.

Andras Olsen á trombon og Ólavur Jakobsen á guitar, fáa gleðini av hansara royndum og samstundis høvi at royna tann serstaka akkustikkin, ið er í hølunum á Skipasmiðjuni.

Andras er júst undir fyrireikingum til endaligu konsertini á Kongaliga Tónlistarskúlanum í Keypmannahavn, har ið hann í vár hevur sokallaða debutkonsert. Hetta er próvtøkan og er tað ein almenn konsert. Andras fer at framføra partar av hesi konsert og býðst høvið at hoyra m.a. sera tórføra og krevjandi verkið Sequensa hjá italiumanninum Luciano Berio.

Framsýningin og konsertin er í grøna bygninginum. Inngongdin er sunnanfyri. Høvið er sjálvandi at skoða framsýningina í steðginum á konsertini. Ókeypis atgongd er til konsertina.

Framsýningin verður leygardagin kl. 15.00 og tá fer Andras Olsen at framføra á trombonini.

Konsertin við Aldubáruni er sunnudagin kl. 16.00